# VB vann báðar



*Tað stóð nógv á, men VB var kaldari í avgerandi løtunum, og vunnu tí tvey sera týdningarmikil stig, sum kunnu fáa nógv at siga í oddastríðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Kvinnurnar hjá VB vóru norðanfjørðs um vikuskiftið, og burtur úr tveimum dystum fingu tær fýra stig við sær á ferðini suðuraftur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at menninir í fótbóltskappingini gjørdu bart hetta kappingarárið, er tað nú líkt til, at hondbóltskvinnurnar í bygdini hava ætlanir um at gera teimum kynstri eftir.

At byrja við vildi kanska ikki rigga so væl hjá teimum, men sum grundspælið leið, gjørdust avrik teirra alt meira sannførandi, og tá seinasti dysturin í hesum varð vunnin móti Stjørnuni, mundi hondbóltsfepurin av álvara tendra.

### Linligt á Giljanesi

Fyrstu dystirnir hjá VB í endaspælinum skuldu so spælast hetta vikuskiftið, og tað mundi vera við góðum treysti, at farið varð norður um fjørðin.

Fyrsti dysturin var á Giljanesi, har Sóljan stóð fyri skotum. Eftir ein heldur linligan fyrra hálvleik, har VB førdi 13-9, settu tær av álvara ferð á í seinna. Átta mál á rað beindu allan iva burtur, og hareftir var bert ein spurningur um at fáa tíðina at ganga. Endaliga úrslitið gjørdist ein tryggur 30-15 sigur.

### Gjørdist trupult

Í Havn mundu VB kvinnurnar eisini ætla sær ein tryggan sigur, men tá tað kom til stykkis, skulu tær helst vera fegnar um, at tað yvirhøvu eydnaðist teimum at fáa tvey stig við sær úr dystinum.

Frá byrjan av góvu tær á heimaliðnum gestunum ein skarpan gang, og hóast VB fekk skapt sær eina leiðslu móti endanum av hálvleikinum, so fall Neisin ikki á nakran hátt á fátt.

Spakuliga stríddu tær seg inn aftur í dystin, og tá seinni hálvleikur var hálvrunnin, høvdu tær á heimaliðnum vunnið seg framum gestirnar. Nú byrjaði nervakríggið av álvara, og bæði liðini góvu alt tað tey høvdu í sær, til tess at ogna sær sigurin.

Tað skuldi tó vísa seg, at tað, sum gjørdist heilt avgerandi fyri dystin, var at VB í størri mun megnaði at halda høvdið kalt, tá harðast leikaði á.

Neistin vann seg tvey mál fram um, men eftur hetta megnaði at skjóta fýra mál á rað, soleiðis at tær førdu við tveimum málum, tá hálvur annar minuttur var eftir at leika.

Fjøruti sekund seinni var munurin minkaður í eitt mál, og hóast VB nevyan hevði møguleika at nøla seinasta álopið heim, so fóru neistakvinnurnar út eftir mótstøðuliðnum. Úrslitið var, at VB kundi skora enn einaferð, og hóast Neistin innan fá sekund aftur hevði minkað í eitt mál, so skuldi VB nú bert hava 15 sekund at ganga síðstu løtuna.

Tað eydnaðist teimum eisini at vinna sær tríggja metra kast, og so var tíðin farin.

### Tykist ov seint

Við sigrinum staðfesti VB støðu sína sum næst besta lið í landinum, og hóast Stjørnan helst eisini vil hava okkurt at siga í so máta, so er veruleikin tann, at trý stig skilja liðini á stigatalvuni.

Fyri Neistan mundi tað kennast sum seinasta farvæl til møguleikan fyri heiðursmerkjum, men hinvegin hava tær einki at skammast av í avrikinum sunnudagin. Stríðsviljin var á hædd við tann, sum so ofta fyrr hevur eyðmerkt liðið, og megna tær at halda hesum uppi, fara tær at kalla við vissu at órógva onnur av ovaru støddu liðunum.

Neyvan verður talan um heiðursmerki. Til tess hava tær helst mist ov nógv longu nú, men hinvegin, so var hetta eisini fatanin millum manna, tá kappingin í fjør var hálvrunnin, so møguliga er tað kortini ov tíðliga at avskriva tær.

### Dystirnir í tølum

*Sóljan-VB 15-30 (9-13)*
Eingin dómaraseðil komin

*Neistin-VB 23-24 (11-13)*

*Málskjúttar:*
*Neistin:* Annika Thomsen 14(3), Súna Mørk 5, Susan Brockie 3, Bjørg Patursson 2, Katrin á Neystabø 2, Birita Wardum 2
*VB:* Regina Radó 9(4), Andrea Lütz 6, Christina Holm 4, Gurið Mortensen 2, Sólrun Krosslá 2, Mary Krosslá 1

*Brotskøst:*
Neistin 3, VB 4
*Útvísingar:*
Neistin 4, VB 1

*Dómarar úr Kyndli:*
Hanus Kúrberg
og Hannis Wardum

**Máltindurin:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 106 | (23) |
| Ioana Rapa | VÍF | 96 | (22) |
| Regina Radó | VB | 92 | (31) |
| Vesna Tomajek | Stjørnan | 91 | (27) |
| Annika Thomsen | Neistin | 89 | (16) |
| Sóleyð Mikkelsen | VÍF | 80 | (27) |
| Nicolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 64 | |
| Andrea Lütz | VB | 62 | |
| Gurið Mortensen | VB | 62 | (4) |
| Fríða Marjunardóttir | VÍF | 61 | (8) |
| Jórun Ludvig | Kyndil | 59 | (11) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 57 | |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 54 | (5) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 51 | |
| Beinta Joensen | Tjaldur | 49 | (9) |

Málskjúttarnir úr dystinum, Sóljan-VB, eru ikki taldir við í listanum.

**Máltindurin:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Halgir D. Olesen | H71 | 103 | (13) |
| Bjarni Wardum | Kyndil | 87 | (17) |
| Ingi Olsen | VÍF | 86 | (20) |
| Artur Johansen | StÍF | 76 | (22) |
| Dorica Tomic | KÍF | 71 | (22) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 69 | (8) |
| Jónleif Sólsker | Kyndil | 65 | (22) |
| Sámal Joensen | VÍF | 63 | (3) |
| Áki Olsen | VÍF | 59 | (4) |
| Martin Hummeland | VÍF | 58 | |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 57 | (14) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 52 | (6) |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 46 | (3) |
| Jens Martin Knudsen | Tjaldur | 46 | (12) |
| Marius Joensen | StÍF | 45 | (1) |

**Støðan 1. deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. VÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 389 | 211 | 178 | 14 |
| 2. VB | 2 | 2 - 0 - 0 | 358 | 265 | 93 | 13 |
| 3. Stjørnan | 1 | 0 - 0 - 1 | 353 | 288 | 65 | 10 |
| 4. Neistin | 1 | 0 - 0 - 1 | 279 | 293 | -14 | 5 |
| 5. Kyndil | 0 | 0 - 0 - 0 | 270 | 323 | -53 | 5 |
| 6. Sóljan | 1 | 0 - 0 - 1 | 233 | 349 | -116 | 2 |
| 7. Tjaldur | 0 | 0 - 0 - 0 | 169 | 322 | -153 | 1 |

**Støðan 1. deild menn**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. VÍF | 12 | 11 - 1 - 0 | 394 | 284 | 110 | 23 |
| 2. StÍF | 12 | 7 - 1 - 4 | 355 | 313 | 42 | 15 |
| 3. Kyndil | 12 | 6 - 3 - 3 | 337 | 303 | 34 | 15 |
| 4. Neistin | 12 | 6 - 0 - 6 | 287 | 303 | -16 | 12 |
| 5. H71 | 12 | 4 - 0 - 8 | 313 | 340 | -27 | 8 |
| 6. Tjaldur | 12 | 3 - 0 - 9 | 276 | 365 | -89 | 6 |
| 7. KÍF | 12 | 2 - 1 - 9 | 263 | 317 | -54 | 5 |



VIÐMERKINGAR

# Alt verður sjálvsagt tryggjað

**Lisbeth L. Petersen**
*løgtingslimur*

So avgjørdur er landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum, Høgni Hoydal, í grein við yvirskriftini Føroysk løgregla – ein avbjóðing, har hann viðger spurningin um yvirtøku av løgregluni.

Ongin kann siga annað, enn at landsstýrismaðurin er produktivur. So produktivur, at tað skal orka og tíð til at svara aftur ella seta spurningar til hansara avgjørdu meiningar. Tað er spell, tí har er ikki altíð samsvar millum útsagnir hansara; men nú hevur so ein politistur, sum hevur aðra meining, dittað sær at siga sína hugsan og at seta spurningar, og tað gevur so almenninginum nakað at hugsa um, tíbetur.

At tað er ein avbjóðing at fáa eina føroyska løgreglu, kunnu vit vera samd um, men hví skulu vit leita eftir nýggjum, stórum og kostnaðarmiklum avbjóðingum, tá vit ikki enn hava tey røttu argumentini fyri, at vit eru før fyri at reka eitt føroyskt vælferðarsamfelag, sum støðan er í løtuni?

Tað er bláoygt at trúgva, at tá vit avgera alt einsamøll, so verður alt betri. Tað sama er galdandi, tá landsstýrismaðurin fortelur okkum so avgjørdur, hvat danir hugsa og gera. Og tað er ikki bara bláoygt ella naivt, tað er beinleiðis misvísandi, fyri at brúka milt orð.

### Vinnan skuldi fíggja

Føroyska vinnan skuldi vera trygdin og álitið í nýggja fullveldinum, tí hon skuldi mennast og harvið fíggja mistu inntøkumøguleikarnar, sum vit annars eiga í dag, umframt at okkara samfelag skuldi rekast so »rationelt og effektivt«, at alt fór at bera til. Neyðugt skuldi ikki verið at nevnt her, at tá var talan um at skera »skaðiligu« donsku heildarveitingina burtur, sum í løtuni er triðingurin av føroysku fíggjarlógini.

Tá talan er um vinnuna, so má ásannast, at hon er sárbar, og tað er eisini galdandi fyri okkara høvuðsvinnu, fiskivinnuna. Fiskaríkidømi eiga vit ikki æruna av sjálvi, tað kemur og fer, og ávirkan á prísir á verðinsmarknaðinum hava vit heldur ikki. Í løtuni er okkara vinna illa fyri av høgum oljuprísum, sum vit heldur ikki hava ávirkan á, og soleiðis kundi verið hildið fram. Men sjálvandi kunnu vit, um vit bera okkum skilagott at, troyta teir møguleikar, sum vera latnir okkum, eru vit heppin, og tað hava vit verið seinastu tíðina á fleiri økjum.

### Postulatini

Fyri at venda aftur til spurningin um yvirtøkur, avbjóðingar og fullveldi, ella hvat tey so fara at kalla tað í framtíðini, (loysing ella tjóðveldi eru ikki orð, sum eru in í løtuni) so hevur sami landsstýrismaður ferð eftir ferð sagt, at vit ikki skulu verða verri fyri, tá alt verður so føroyskt, sum hann vil hava tað.

Í sambandi við Hvítubók, segði hann t.d., at hon lýsir »worst case« – hesum hava fleiri búskaparfrøðingar longu afturvíst fleiri ferðir.

Bíligari fyrisiting er eisini eitt av teim postulatum, sum landsstýrismaðurin hevur nevnt – Har er so onki hent, sum kann prógva tað. Tvørturímóti!



Sum dømi nevnir hann m.a í blaðgrein við yvirskriftini Við reim og selum, at okkara fyrisiting byggir á danskar fyritreytir, sum upprunaliga eru ætlaðar einum donskum tørvi, og í einum fullveldi verður neyðugt við umskiping, samanlegging og tillaging av stovnum og arbeiðsgongdum til føroysk viðurskifti – bæði hvat viðvíkur fortreytum og tørvi. Hetta eigur at kunna hava við sær, at umsitingin fer at kosta minni enn tað, sum tølini í frágreiðingini vísa. Og hann endar við at siga, at »har eru uttan iva stórir pengar at vinna«!

Enn er so onki hent, sum prógvar slíkt úttalilsi!

### Hvítabók

Í fyrstnevndu greinini hjá landsstýrismanninum, sum viðger spurningin um løgregluna í framtíðini, vísir hann til ymiskt í Hvítubók, sum skal undirbyggja tað, hann sigur.

Men lesa vit fylgibind 2. til somu bók, so stendur t.d. á bls. 11 um Løgreglu og Ákæruvald, at føroyskt fullveldi er ført fyri at átaka sær ábyrgdina av lóggávu og fyrisiting á hesum øki. »Men fíggjarliga er talan um eitt rættiliga tungt øki« Her ber so til hjá teimum, sum eiga bøkurnar, at lesa sjálvi um mettu 63 mill. kr. o.a.

Á bls. 14 í sama fylgibindi verður INTERPOL og møguliga Schengensamstarvið nevnt (sera aktuelt í løtuni) undir heitinum Millumtjóða samstarv, og her verður sagt : »Hetta fer helst at krevja 3 – 4 ársverk afturat í løgregluni«.

So, hvar fór nú argumentið fyri umsitingarligari sparing?

Í somu grein skrivar landsstýrismaðurin eisini, at »vinnumøguleikarnir, livistøðið og almenna tænastustøðið skulu ikki versna. Tað er orsøkin til, at vit fegnast um kanningarúrslitini í Hvítubók. Tey vísa púra greitt, at tað ber til at røkka aðalmálinum – og væl tað «

Hesum eru, sum áður nevnt, búskaparfrøðingar ikki samdir við honum í.

### Føroyska løgreglan í framtíðini

Starvsviðurskifti og sáttmálar verða ikki verri, sigur Høgni Hoydal, og formaðurin í Føroya Politistafelag sigur seg hava fingið at vita, at útbúgvingin verður hin sama (donsk?) og møguleikarnir eins góðir við víðariútbúgving.

Júmen, hvussu kann landsstýrismaðurin tryggja teimum og okkum øllum, sum vilja hava eina vælvirkandi og góða løgreglu, slíkt ?

Er tað veruliga so, at fullveldissamgongan í Tinganesi stendur aftanfyri slíkar pástandir?

# Verjustøð ikki hernaðarstøð

**Børge J.H. Christiansen,**
*Cand. Merc. Aud.*
*Skrásettur grannskoðari*

Dette er ikke et læserbrev, men blot er præcisering af nogle begreber.

Som gammel overkonstabel af 1. Grad (jeg forlod militæret í 1984) irriterer det mig gang på gang at læse, at ordet forsvar sættes lig med hæren. Som er eksempel kan jeg nævne, at der í Sosialurin for nogen tid siden stod, at chefen for hæren var på besøg på Færøerne I forbindelse med sammenlægningen af Marinestøðin og Flyvestation Tórshavn. Jeg vil gerne vide, hvad en hær-mand skulle have at gøre I forbindelse med at to andre værn lægges sammen. Det korrekte er selvfølgelig, at det var forsvarschefen, der var på besøg (forsvar=verja). Jeg kunne også læse I en overskrift í Dimmalætting, at der var en hærchef, der var på besøg, men I artiklen havde de skrevet korrekt, at der var tale om en forsvarschef.

I lørdags måtte jeg så læse, at der nu kun var hærafdeling på Færøerne. Nej, der er ingen hærafdeling, men der er kun ern forsvarsafdeling på Færøerne.

Nu er jeg selvfølgelig klar over, at problemet ligger I, at ingen færinger er værnepligtige, så for dem er det jo det samme, om der er tale om hæren eller forsvaret. Men da jeg var inde I Flyvevåbnet (ikke hæren), var der 3 værn: Hæren, Søværnet og Flyvevåbnet. Hver af disse værn havde en øverstoverordnet chef, som hed henholdsvis: chef for hæren, chef for søværnet og chef for flyvevåbnet. Som chef over dem var der så en forsvarschef.

Jeg vil forslå jer, at I får jer en snak med den overordnede for forsvarsafdelingen í Mjørkadali. Han vil sikkert kunne forklare jer, hvordan opdelingen I forsvaret er nu. Det er jo trods alt næsten 17 år siden, at jeg forlod forsvaret.

Føroyar anno 2001

## Er tað hetta føroyakortið, løgtings- og landsstýrismenn vilja síggja í framtíðini?



**Finnleif Guttesen**
*borgarstjóri*



Eru tað útlendskar fyritøkur sum skulu ráða í Føroyum, har løgtings- og landstýrismenn bert nikka og góðtaka tær loysnir sum hesar fyritøkur koma við?

Sum ikki einaferð, so bleiv tað við sjey tumma seymi staðfest av oljufeløgunum, at Suðuroyggin er ein útoyggj, fólkatalið minkar, tey ungu sum fáa sær eina útbúgving vilja gjarna koma aftur til oynna, men her er einki arbeiði at koma aftur til.

Í orðaskiftinum um eina oljuútgerðarhavn, siga norðingar, at suðringar kunnu bara bjóða seg fram í miðstaðarøkinum og tað er eingin ivi um, at tað koma suðringar at gera, tí dugandi eru teir, men hetta fer at hava ta avleiðing við sær, at fólkatalið minkar enn meira, tí sambandið við Suðuroynna er so vánaligt at tey, sum bjóða seg fram í oljuvinnuni vera noydd at flyta til miðstaðarøki, hetta máttu sjálvt løgtings- og landsstýrismenn skilt!

Um hetta er viljin hjá løgtinginum, ja so skulu løgtingsmenn bert gera sum nú, sita hendur í favn, seta nakrar nevndir og so hendur einki meir.

Tvøroyri, tann 15. januar 2001.